# Torraskráin 2018

## Mánadagur 19. februar

### Kl. 14 - 17: Listaframsýning í Gamla seglhúsi



Gamla seglhúsið er karmur um søluframsýning við 36 verkum hjá Bárði Jákupssyni.

Tað er ókeypis at vitja framsýningina.

### Kl. 14 - 17: Framsýning í Posthúskjallaranum

**HAV – Ein framsýning um Blue Fashion Challenge**
Ein framsýning við klæðum, ið vórðu gjørd til altjóða sniðgevarakappingina Blue Fashion Challenge. Við á framsýningini eru eisini myndir, sum heimskendi myndamaðurin Tommy Ton tók, millum annað í Klaksvík.

Alt tilfarið, sum varð brúkt í kappingini, hevði sín uppruna úr havinum so ella so – t.d. úr tara, kópaskinn og fiskaskræðu.

Kappingina vann føroyska Sissal Kjartansdóttir Kristiansen í dysti við 10 aðrar norðurlendskar kvinnur.

### Kl. 16: Framsýningin verður sett í Posthúskjallaranum

**HAV – Ein framsýning um Blue Fashion Challenge**
Framsýningin verður ament sett kl. 16.00 av landsstýrismanninum í fiskivinnumálum Høgna Hoydal. Borgarstjórin í Klaksvík, Jógvan Skorheim, og umboð frá NORA luttaka eisini í setanini.

## Kl. 17 - 19: Torradagarnar í Betri




Spennandi fyrilestrar í Betri í samband við Torradagarnar, har boðið verður til áhugaverdar fyrilestrar og kjak í Betri um útlitini á føroyska landgrunninum, við serligum atliti til botnfiskastovnarnar.

Eilif Gaard, stjóri á Havstovuni og Eyðun Hansen, skipari, greiða frá og kjakast.

Tiltakið er ókeypis, og øll eru vælkomin - boðið verður eisini til ein bita

# Týsdagur 20. februar

## Kl. 14 - 17: Listaframsýning í Gamla seglhúsi

Gamla seglhúsið er karmur um søluframsýning við 36 verkum hjá Bárði Jákupssyni.

Tað er ókeypis at vitja framsýningina.

## Kl. 14 - 17: Framsýning í Posthúskjallaranum

**HAV – Ein framsýning um Blue Fashion Challenge**
Ein framsýning við klæðum, ið vórðu gjørd til altjóða sniðgevarakappingina Blue Fashion Challenge. Við á framsýningini eru eisini myndir, sum heimskendi myndamaðurin Tommy Ton tók, millum annað í Klaksvík.



Alt tilfarið, sum varð brúkt í kappingini, hevði sín uppruna úr havinum so ella so – t.d. úr tara, kópaskinn og fiskaskræðu.

Kappingina vann føroyska Sissal Kjartansdóttir Kristiansen í dysti við 10 aðrar norðurlendskar kvinnur.

## Kl. 15: Hugnaløta í Smæruni

**Kvinnurnar og havið**
Vanliga eru tað menninir, sum verða settir í samband við lívið á sjónum. Tað hevur ikki nógv verið skrivað um leiklutin hjá kvinnunum heima.
Óli Jacobsen fer at greiða frá og hugleiða um hesi viðurskifti á fundinum.

Til ber at keypa kaffi og køku eftir framløguna.

## Kl. 17.30: Skrúvuguðstænasta í Christianskirkjuni

Marjun Lómaklett, sóknarprestur prædikar.
Eftir guðstænastuna verður boðið niður í kirkjukjallaran, har kjøtsós og skrúvur eru at fáa.

## Kl. 19.30: Hugleiðingar í Miðhøllini á Skúlatrøð

Við støði í bókini "Herskin herðindi" hugleiðir Arnstein Niclasen, rithøvundur um læknastríðið í Klaksvík, sum vardi frá 1952-1956.

Eftir at bókin er komin út, hava fleiri blaðkjak verið um skrivingina og eygleiðingina hjá Arnstein av læknastríðnum, sum so ymiskar meningar eru um.

Bókin er eitt frambrot um læknastríðið í Klaksvík – og hesum parti av Klaksvíkar søgu.
Hesaferð er tað Arnstein Niclasen, sum kemur rættiliga vítt umkring við bókini.

## Kl. 20: Fyrilestur í Íverksetarahúsinum

**Møguleikar, um tú hugsar um víðari lestur ella karrieruskifti**

Fyrilestur við Deirdre Hansen, lestrar- og karrieruvegleiðari á Fjarnámi

Hugsar tú um at menna teg fakliga, um at fáa annað arbeiði ella at taka eina útbúgving?
Týsdagin bjóðar Fjarnám inn til ein fyrilestur, og aftaná er møguligt at fáa eitt prát og vegleiðing um, hvussu hetta kann gerast

Fyrilesturin er ókeypis.
Íverksetarahúsið, Garðavegur 57.

# Mikudagur 21. februar

## Kl. 14 - 17: Listaframsýning í Gamla seglhúsi

Gamla seglhúsið er karmur um sølyframsýning við 36 verkum hjá Bárði Jákupssyni.

Tað er ókeypis at vitja framsýningina.

## Kl. 14 - 17: Framsýning í Posthúskjallaranum

**HAV – Ein framsýning um Blue Fashion Challenge**
Ein framsýning við klæðum, ið vórðu gjørd til altjóða sniðgevarakappingina Blue Fashion Challenge. Við á framsýningini eru eisini myndir, sum heimskendi myndamaðurin Tommy Ton tók, millum annað í Klaksvík.

Alt tilfarið, sum varð brúkt í kappingini, hevði sín uppruna úr havinum so ella so – t.d. úr tara, kópaskinn og fiskaskræðu.

Kappingina vann føroyska Sissal Kjartansdóttir Kristiansen í dysti við 10 aðrar norðurlendskar kvinnur.

## Kl. 15: Sang- og hugnaløta í Smæruni

**Sang- og hugnaløta av Stongunum**
Janus Jacobsen, Steinbjørn O. Jacobsen, Eyðun Jacobsen og Henny Gerðalíð syngja og siga frá.

Til ber at keypa kaffi og køku eftir framløguna.

# Hósdagur 22. februar

## Kl. 10: Torracafé í Betesda

**Hugleiðingar um og frá Ólavi Halga – Jógvan á Lakjuni sigur frá**

Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður, sum sigldi við trolara í sínum ungu døgum, m.a. við Sundabergi og Ólavi Halga, fer at siga frá søguni um Ólav Halga, og hvønn týdning hann hevði fyri Fuglafjørð og økið har um vegir.



Eisini fer hann at hugleiða eitt sindur um pápa sín, Jákup Oluf á Lakjuni, og hetta at vaksa upp í einum sjómannaheimi.

Í 1996 gav forlagið Heygsmørk út bókina "Ólavur Halgi - fiskiskip og vaktarskip". Tað var kokkurin, Leif Pedersen, sum sigldi við Ólavi Halga í mong ár, sum gav bókina út, har Jógvan á Lakjuni eisini hevði ein fingur við í spælinum.

Sangur verður eisini á skrá.

Aftaná verður boðið til stóra Torra-kaffiborðið, har sangur og hugnaløta er á skránni.

## Kl. 14 - 17: Listaframsýning í Gamla seglhúsi

Gamla seglhúsið er karmur um sølutramsýning við 36 verkum hjá Bárði Jákupssyni.

Tað er ókeypis at vitja framsýningina.

## Kl. 14 - 17: Framsýning í Posthúskjallaranum

**HAV – Ein framsýning um Blue Fashion Challenge**
Ein framsýning við klæðum, ið vórðu gjørd til altjóða sniðgevarakappingina Blue Fashion Challenge. Við á framsýningini eru eisini myndir, sum heimskendi myndamaðurin Tommy Ton tók, millum annað í Klaksvík.

Alt tilfarið, sum varð brúkt í kappingini, hevði sín uppruna úr havinum so ella so – t.d. úr tara, kópaskinn og fiskaskræðu.

Kappingina vann føroyska Sissal Kjartansdóttir Kristiansen í dysti við 10 aðrar norðurlendskar kvinnur.

## Kl. 15: Hugleiðingar í Smæruni

**Mortan Johannesen hugleiðir og greiðir frá sjólívi sínum**
Til ber at keypa kaffi og køku eftir framløguna.

## Kl. 16 - 18: Opið skip umborð á Draganum

**Til ber at kunna seg um virksemið umborð á skúlaskipinum**
Næmingar arbeiða við togverki, spleysa, takla og bensla.

## Kl. 18: Konsert í Skálanum

**Konsert við tónlistaskúlanum**
Klaksvíkar Tónlistaskúli hevur konsert í Skálanum í sambandi við Torradagarnar. Talan er eina kamartónleikakonsert við fleiri smærri bólkum.

Konsertin er ókeypis, og øll eru vælkomin.

## Kl. 19: Filmurin "Línumenn" í Atlantis

**Søgan um okkara stál- saltlínuskip á fjarleiðum**
Zacharias Hammer hevur gjørt nýggja filmin "Línumenn", sum er góðar tveir timar langur. Í filminum fortelja fleiri menn um, tá teir sum 14 til 17 ára gamlir fóru við teimum nýggju línuskipunum, sum avloystu sluppirnar.

Kostnaður kr. 100,-

## Kl. 19.30: Bindiskeið á Klaksvíkar Bókasavni

**Bindiskeið**
Sára Mrdalo frá Navia fer at læra okkum at binda tríggjar ymiskar bindihættir – Sokkamynstur, Blondumynstur og Strukturmynstur (táramynstur).

At hava við: Tveir ymsar litir av tógvi, sum hóska til stokk umleið nr. 4 og 5 ermastokkar nr. 4.
Bókasavnið bjóðar ein drekkamunn.

## Kl. 19.30: Fyrilestur í Miðhøllini á Skúlatrøð

**"Hvussu ferðast makrelurin, sildin og svartkjafturin – Nakað um kvotusamráðingar"**
Jan Arge Jacobsen, fiskifrøðingur greiðir frá, hvussu pelagisku fiskasløgini ferðast og hvat ávirkar teirra ferðingamynstur. Eisini kemur hann inn á, hvar og nær pelagiskur fiskur verður fiskaður.

Eisini verður greitt nakað frá kvotusamráðingunum, sum onkusvegna skulu taka atlit til altjóða krøv, ynski frá politisku skipanini og ynski frá sjómanninum.

## Kl. 20.15: Fyrilestur í Miðhøllini á Skúlatrøð



**"Støðan hjá føroyska sjófuglinum"**

Silas Olofson greiðir frá.

Føroyar hava alstóran týdning sum búpláss hjá milliónum av sjófuglum. Men hvussu er sjófuglurin fyri, og hvørjir vandir eru fyri sjófuglum kring Føroyar?

Í hesum fyrilestri fara vit at hoyra um tey ymisku sjófuglasløgini, ið eiga í Føroyum. Vit fara at hyggja eftir gongdini, stovnsmetingum og samanbera við gongdina í grannalondum okkara. Fyrilesturin verður kryddaður við vøkrum myndum, sum Silas m.a. hevur tikið av teimum ymisku sløgunum, og greitt verður frá, hvussu vit greina tey.

# Fríggjadagur 23. februar

## Kl. 14 - 17: Listaframsýning í Gamla seglhúsi

Gamla seglhúsið er karmur um søluframsýning við 36 verkum hjá Bárði Jákupssyni.

Tað er ókeypis at vitja framsýningina.

## Kl. 14 - 17: Framsýning í Posthúskjallaranum

**HAV – Ein framsýning um Blue Fashion Challenge**
Ein framsýning við klæðum, ið vórðu gjørd til altjóða sniðgevarakappingina Blue Fashion Challenge. Við á framsýningini eru eisini myndir, sum heimskendi myndamaðurin Tommy Ton tók, millum annað í Klaksvík.

Alt tilfarið, sum varð brúkt í kappingini, hevði sín uppruna úr havinum so ella so – t.d. úr tara, kópaskinn og fiskaskræðu.

Kappingina vann føroyska Sissal Kjartansdóttir Kristiansen í dysti við 10 aðrar norðurlendskar kvinnur.

## Kl. 15: Hugnaløta í Kirkjukjallaranum

**Viður og litir gerast livandi søgur**
*- ein ferð inn í Jesus søgurnar hjá Edward Fuglø í Christianskirkjuni*

Poul F. Guttesen, Ph.D í guðfrøði hugleiðir um listaverkini hjá Edward Fuglø, Jesus úr Nasaret. Marjun Lómaklett, sóknarprestur leiðir løtuna.

Framløgan verður gjørd við støði í bókini "Boðskapurin í trænum", sum nýliga er útkomin.

Eisini verður kryddað við heimspekingum, sum umtala henda mátan at sýna listaverk uppá, har gerandislutir verða lagdir inn í listaverkið, sum kanska í annan máta hava eina serliga søgu at siga ella ein boðskap, sum í hesum føri.

Her eru nógvar serliga áhugaverdar eygleiðingar, Poul F. Guttesen, Ph.D í guðfrøði, hevur gjørt sær við hesum meistaraverki hjá Edward Fuglø.

Aftaná verður boðið til ein drekkamunn.

## Kl. 16 - 18: Opið skip umborð á Draganum

**Til ber at kunna seg um virksemið umborð á skúlaskipinum**
Næmingar arbeiða við togverki, spleysa, takla og bensla.

## Kl. 19: Filmurin "Línumenn" í Atlantis

**Søgan um okkara stál- saltlínuskip á fjarleiðum**

Zacharias Hammer hevur gjørt nýggja filmin “Línumenn”, sum er góðar tveir timar langur.

Í filminum fortelja fleiri menn um, tá teir sum 14 til 17 ára gamlir fóru við teimum nýggju línuskipunum, sum avloystu sluppirnar.

Kostnaður kr. 100,-

## Leygardagur 24. februar

### Kl. 11.30: Matiné í Christianskirkjuni

**Vælkomin til hugnaliga Torramatiné**
Christianskirkjan bjóðar til Torramatiné við góðum kórsangi leygarmorgunin 24. februar kl. 11.30. Kórið Eystanljóð úr Eysturkommunu kemur at framføra sálmar og aðrar kirkjuligar satsir.

Matinéin varar uml. 30-40 minuttir - kaffihugni verður í kirkjukjallaranum aftaná.
Kórið hevur verið virkið síðani 1987, og telur umleið 30 sangarar - kórleiðari er Leif Hansen.

Kórið framførir vanliga bæði siðbundnan og nýggjan tónleik, kirkjutónleik og verðsligan tónleik, føroyskt og útlendskt.

### Kl. 14 - 20: Opið atelier hjá Edwardi Fuglø, Jústabrekka 2

Edward Fuglø, listamaður letur dyrnar upp í atelieri sínum, har hann sýnir fram listaverk og bøkur, hann hevur skrivað og listprýtt.

### Kl. 14 - 17: Listaframsýning í Gamla seglhúsi

Gamla seglhúsið er karmur um søluframsýning við 36 verkum hjá Bárði Jákupssyni.

Tað er ókeypis at vitja framsýningina.

### Kl. 14 - 17: Framsýning í Posthúskjallaranum

**HAV – Ein framsýning um Blue Fashion Challenge**

Ein framsýning við klæðum, ið vórðu gjørd til altjóða sniðgevarakappingina Blue Fashion Challenge. Við á framsýningini eru eisini myndir, sum heimskendi myndamaðurin Tommy Ton tók, millum annað í Klaksvík.

Alt tilfarið, sum varð brúkt í kappingini, hevði sín uppruna úr havinum so ella so – t.d. úr tara, kópaskinn og fiskaskræðu.

Kappingina vann føroyska Sissal Kjartansdóttir Kristiansen í dysti við 10 aðrar norðurlendskar kvinnur.

## Kl. 14: Torra-renning niðanfyri Sjúkrahúsið



Talan er um heilsurenning, og tí er ikki neyðugt við tilmelding. Øll eru hjartaliga vælkomin at luttaka, tvs. at renna og/ella ganga.

Eins og undanfarin ár byrja vit niðanfyri Sjúkrahúsið, og so renna/ganga vit heimeftir gjøgnum býin til Betri, og síðan úteftir móti Grøv/Skarðhamar, ella har, man er staddur eftir 15 min.

Eftir 15 minuttir venda vit aftur móti Sjúkrahúsinum, har málið er.

## Kl. 14 - 17: Heilsucafé og opið Sjúkrahús

Sjúkrahúsið hevur opið hús millum 14.00 og 17.00, og øll eru vælkomin.
– inngongd millum Norðoya Røktarheim og Klaksvíkar sjúkrahús.

### Kl. 14.00 Heilsucafé

Heilsucaféin letur upp, og ymiskt leskiligt er at fáa í kantinuni.

### Kl. 14.30 Heilsucaféin verður sett

Jógvan Skorheim, borgarstjóri, setur Heilsucaféina. Eftir setanina verður boðið til ymiskt heilsugott og leskiligt afturvið.

### Kl. 14.00 Workshop

**Heilsustovan (2. hædd)**
Vit máta virðir, so sum blóðtrýst, puls, iltmetting í kroppinum og blóðsukur.

**Fysio- og ergoterapiin**

Til ber at gera eina konditest, og at máta feittvirðið í kroppinum.

**Rannsóknarstovan**
Tilmelding til blóðgeva.

### Kl. 15.00: Fyrilestur í Felagshøllini
Jógvan Skorheim, borgarstjóri leggur fram um nýggja Mentanarhúsið í Klaksvík.

## Kl. 15: Søgur av Flemish Cap í Miðhøllini á Skúlatrøð

**Søgur av Flemish Cap**
Helgi Jacobsen, rithøvundur hugleiðir um, tá tær fyrstu føroysku fiskiroyndirnar í nýggjari tíð vórðu gjørdar á Flemish Cap. Hetta var í 1956 við Atlantsfarinum, sum Poul Hansen, reiðari í Havn hevði leigað frá Onnu Isaksen í Klaksvík.

Fleiri norðoyingar vóru við henda túrin, millum aðrar Osvald og Martin Sivertsen, Jógvan Isaksen, Einar Jacobsen og Óli Wolles. Skipari var Júst í Túni.

Eyðun Mohr Viderø, fyrverandi løgtingslimur greiðir frá túri, hann var við Beinir í 1958 á Flemish Cap, har Eiler Jacobsen var skipari.

**Gunnar Nolsøe, útvarpsmaður – "Tónleikur, móti og prát frá Flemish Cap."**
Gunnar hevur samrøðu við menn, sum hava roynt seg á Flemish Cap.

Aftaná verður boðið til ein kaffimunn og sjómansprát av Flemish Cap, umframt ein brellbita av Flemish Cap (saltfiskarætt).

## Kl. 19: Syngið við í Skálanum

**Syngið við kvøld**
Harmonikan spælir so lystiliga og tú sleppur at syngja við til góðar gamlar sjómanssangir. Til ber at keypa sær ein bita og okkurt leskandi afturvið.

Eisini verður boðið til lekrar fiska-brellbitar.
Tiltakið er ókeypis.

## Kl. 19: Filmurin "Línumenn" í Atlantis

**Søgan um okkara stál- saltlínuskip á fjarleiðum**
Zacharias Hammer hevur gjørt nýggja filmin “Línumenn”, sum er góðar tveir timar langur. Í filminum fortelja fleiri menn um, tá teir sum 14 til 17 ára gamlir fóru við teimum nýggju línuskipunum, sum avloystu sluppirnar.

Kostnaður kr. 100,-

## Kl. 22: Kátir rokk-, fólka og bluestónar í Spaniastovu

**Konsert við feðgunum Holbæk og feðgunum Nolsøe/Ranason**

**Feðgarnir Holbæk**
Feðgarnir Holbæk eru ein bluesduo av Tvøroyri, við feðgunum Kristian og Óla.

Teir spæla eina blanding av aukustiskum Missippi delta blues, soul og nýggjari blues. Kristian er forsangari í Froðbiar Sóknar Bluesorkestri, har Óli eisini hevur spælt við á onkrum konsertum.

**Feðgarnir Nolsøe og Ranason**
Tá Nolsøe og Ranason fara á pall, verða tað sangirnir hjá pápanum og rokkaranum í Frændum, sum teir fara at tulka - og har gera teir bart!

Teir fara heilt aftur til byrjanina við løgum sum “Kendar gøtur” og “Bløðini spretta”, og umvegis Frændur V til teir nýggju sangirnar, sum Rani hevur givið út í 2017 - og enntá til eina frumframførslu av einum nýggjum lag, sum fer at koma út í næstum.
Meðan Eyðun arbeiðir nógv við tónleikinum á musikmiðnám, spælir Rani regluliga sum trubadurur.

Tilfarið er legendariskt, feðgarnir eru í toppformi og karmarnir í Spaniastovu søguligir - tað fær valla verið betur.

Atgongumerki á kr. 150,- kunnu keypast á www.atgongumerki.fo

# Sunnudagur 25. februar

## Kl. 11.00: Christianskirkjan



**Torraguðstænasta við altargongd**
Hanus á Gørðum, sóknarprestur prædikar og Daisy Lolk Johannesen syngur.

## Kl. 14 - 18: Opið ateliér hjá Edwardi Fuglø, Jústabrekka 2

Edward Fuglø, listamaður letur dyrnar upp í atelieri sínum, har hann sýnir fram listaverk og bøkur, hann hevur skrivað og listprýtt.

## Kl. 14 - 18: Listaframsýning í Gamla seglhúsi

Gamla seglhúsið er karmur um søluframsýning við 36 verkum hjá Bárði Jákupssyni.

Tað er ókeypis at vitja framsýningina.

## Kl. 16: Filmurin "Línumenn" í Atlantis

**Søgan um okkara stál- saltlínuskip á fjarleiðum**
Zacharias Hammer hevur gjørt nýggja filmin "Línumenn", sum er góðar tveir timar langur. Í filminum fortelja fleiri menn um, tá teir sum 14 til 17 ára gamlir fóru við teimum nýggju línuskipunum, sum avloystu sluppirnar.

Kostnaður kr. 100,-

**Leskiligu matstovurnar í býnum – hjá Jórun, Fríða, Jacqson, og nú eisini Angus Steakhouse, og aðrar við borðreiða í Torravikuni við serligari torra-matskrá, eisini við ymiskum úr fiski.**